

# Starvsfólk til Ellis- og umlættingarheimið

Á Ellis- og umlættingarheiminum eru 25 búfólk og 8 umlættingarpláss.

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum at arbeiða í skiftandi vaktum, svarandi til starvsbrøk 2,8 at seta skjótast gjørligt.

**Vit bjóða**
sjálvstøðug og avbjóðandi størv, sum umfatar allar tættir innan eldrarøkt.

Umframt røktaruppgávur er uppgávan eisini vegleiðing av starvsfólki og praktikkvegleiðing til lesandi og næmingar.

Starvsstaður er bæði Ellis- og umlættingarheimið, tó so at starvsfólkið fyri tað mesta arbeiðir á annaðhvørt Ellisheiminum ella á Umlættingarheiminum.

**Vit ynskja sjúkrarøktarfrøðingar sum:**
- hava hug og hegni at arbeiða innan eldrarøkt
- hevur hug til at skapa eitt so heimligt umhvørvið fyri búfólkini sum gjørligt
- eru fleksiblir og positivir fyri broytingum og hava góð samstarvsevni
- hava hug og hegni at átaka sær vegleiðingsuppgávur

**Førleikakrøv**
Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur.

Tvey størv sum heilsurøktari og ella heilsuhjálpari á setunarbrøkin 0,7 í skiftandi vaktum eru leys at søkja til setan skjótast gjørligt.

Eitt starv sum avloysari fyri heilsurøktara í barnsburðarfarloyvi er leyst at søkja frá 1. nov. 2007 til 1. mars 2008. Setunarbrøkur 0,75.

**Vit bjóða**
sjálvstøðug og avbjóðandi størv, sum umfatar allar tættir innan eldrarøkt.

Umframt røktaruppgávur er uppgávan eisini vegleiðing av starvsfólki og praktikkvegleiðing til næmingar.

Starvsstaður er bæði Ellis- og umlættingarheimið, tó so at starvsfólkið fyri tað mesta arbeiðir á annaðhvørt Ellisheiminum ella á Umlættingarheiminum.

**Vit ynskja starvsfólk sum:**
- hava hug og hegni at arbeiða innan eldrarøkt
- hevur hug til at skapa eitt so heimligt umhvørvi fyri búfólkini sum gjørligt
- vil átaka sær fjølttáttaðar uppgávur
- eru fleksiblir og positivir fyri broytingum og hava góð samstarvsevni
- hava hug og hegni at átaka sær vegleiðingsuppgávur

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. avvarandi sáttmála við Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Idu Sørensen, leiðara, á tlf. 31 73 39 ella 31 18 39.

**Umsókn**
Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum tilmælum skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 2. november 2007. Merkið á umsóknina „Starv á Ellis- og umlættingarheiminum".

**Tórshavnar kommuna**

---



**TØKK**

Hjartaliga takk øll tit sum sendu heilsanir og gávur, og tit sum stukku inn á gólvið á SEV í sambandi við fráfaringardagin hjá Klæmint Weihe 28. september 2007.

**Heilsan**

Elfelagið SEV

---

# AWI-33 TIL SØLU.



Um hóskandi boð fæst, verður m/b„Anna Katrina„ seldur vegna serligar umstøður.
Báturin hevur nýggjan motor og er ný yvirhálaður.
Er klárur til snellu og línuróður.
Fiskiloyvið er bólkur 5B. Hevur eisini loyvið til nakrar dagar á Føroya Banka um summarið.
Reiðskapur og onkur onnur rættindi kunnu møguliga fylgja við eftir avtalu.
Báturin liggur við bátabrúgvarnar við Skálatrøð í Tórshavn.

**Áhugaði kunnu ringja: 310637 /272946.**

---

# TVØROYRAR KVØLDSKÚLI VETURIN 2007/2008

Enn ber til at melda seg til hesi skeið í Tvøroyrar Kvøld –og Ungdómsskúla.

**Frítíðarundirvísing**

| Lærugrein : | Tilmelding hjá | Tlf. |
|---|---|---|
| **Nálatøving** | Elin Johansen | 214058 |
| | | ella 371673 |
| **Máling/ tekning** | Palle Julsgart | 371669 |
| | | ella 371976 |
| **Matgerð (Klænkikostur)** | Tina Midjord | 371962 |
| **Fyrstahjálp** | Naja Mortensen | 371567 |
| **Tónleikur:** | | |
| Hornblástur | Tróndur Enni | 256699 |
| **SRC/ROC-VHF-skeið** | Don Petersen | 591196 |
| **Bridge** | Einar Larsen | 228241 |
| | Dan Erik Johansen | 371454 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning av myndugleikunum.

***Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli tlf. 371582***